


# EVR um páskirnar á Rás2

**Týskvøldið 30. mars kl. 21 á Torginum:**
Gestur: Terji Dalsgaard, vertur: A. Absalonsen (endursending frá 17.03.2009)

**Skírisdagur 1. apríl kl. 12.30:**
Rodmundur í Liða og Absalon Absalonsen, samtala um persónar og hendingar í sambandi við skírisdag

**Langi fríggjadagur 2. apríl kl. 12.30:**
Rodmundur í Liða og Absalon Absalonsen samtala um persónar og hendingar í sambandi við langa fríggjadag.

**1. Páskadagur 4. apríl kl. 12.30:** Rodmundur í Liða og Absalon Absalonsen samtala um uppreisn Jesusar.

**2. Páskadagur 5. apríl kl. 12.30:**Endursending frá Torginum týskvøldið 23.03 gestir: Victor og Mirjam Carlsen

## MERKISDAGAR

**60 ára føðingardagur**
Mikudagin 7. apríl verði eg 60 ár, føðingardagsveitslan verður hildin í Skálanum í Klaksvík, leygardagin, 10. apríl kl. 19. Tey sum ynskja at gleða meg við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin at boða frá við at ringja ella senda sms til telefon 211988, ella við t-posti til isak@football.fo helst áðrenn 5. apríl. Heilsan Ísak Mikladal, Klaksvík.

**95 ára føðingardagur**
5. apríl verður Signhild Danielsen 95 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Silvurbrúdleyp**
Leygardagin 3. apríl hava Katrin og Ingimund Hansen Fuglafjørður silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18 fyri innbodnum.

**Gullbrúdleyp**
Mánadagin 12. apríl kunnu hjúnini Ruth og Billy Olsen halda gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

**Gullbrúdleyp**
Leygardagin 17. apríl hava Helga og Jørgin Gleðisheygg Nes, Gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdahúsinum í Leirvík, kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tey ið vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá innan 8. apríl á tlf. 447160 ella 270876

**Brúdleyp**
Mikudagin 31. mars kl. 16 giftast í Sjóvar kirkju Asbjørg Norðberg og Eyðun Poulsen bæði av Strondum. Opið hús verður kl. 19 í Bygdahúsinum á Strondum, har øll eru hjartaliga vælkomin at heilsa uppá brúðarparið.

**Brúdleyp**
Leygardagin 3. apríl kl. 15 giftast í Glyvra kirkju, Marika Meyevi Soukou og Kaj. J. Skipanes. Veitslan verður í sjókaféini kl. 19 fyri innbodnum.

**Brúdleyp**
Leygardagin 3. apríl giftast Randi Holm, Kvívík og Bárður Brestirson Nielsen, Saltangará. Vígslan verður í Kvívíkar kirkju kl. 15. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Hafnia kl. 18

**Brúdleyp**
Leygardagin 24. apríl giftast Joan Simonsen, Saltangará og Rúni Jallson Niclassen, Skáli. Vígslan verður í Glyvra kirkju kl. 14. Veitslan verður í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19. Tey, ið ynskja at gleða Brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg innan 10. apríl á tlf. 262713, 448051 (Joan) ella 256043, 441603 (Rúni).

# Reglur um heilivágstilskot frá Heilsutrygd

### 1. APRÍL KOMA NÝGGJAR REGLUR UM TILSKOT TIL HEILIVÁG Í GILDI

Tá ið tygum keypa heilivág á apotekinum, kunnu tygum fáa tilskot frá Heilsutrygd. Ein tilskotsnevnd avger, hvønn heilivág Heilsutrygd veitir tilskot til.

Hvussu stórt tilskotið verður, veldst um, hvussu stórar árligu útreiðslurnar til heilivág eru. Tað merkir, at tilskotið hækkar í samsvari við tygara heildarútreiðslur, sum árið líður. Jú størri útreiðslur til heilivág í einum tíðarskeiði á eitt ár, jú størri verður tilskotið. Børn yngri enn 18 og persónar eldri enn 67 ár gjalda ongantíð meira enn 1.195 krónur árliga fyri tilskotsheilivág. Hini gjalda í mesta lagi **1.600 krónur** árliga.

Tilskotsárið er 1 ár. Fyrsta tilskotsárið byrjar tann dagin, ið tygum eftir 1. apríl 2010 keypa tilskotsheilivág fyrstu ferð. Næsta tilskotsárið byrjar tann dagin, ið tygum keypa tilskotsheilivág, eftir at fyrsta tilskotsárið er runnið. Síðan halda tilskotsárini fram á sama hátt.

Heilsutrygd veitir vanligt tilskot til fleiri sløg av heilivági; men tilskot kann eisini verða veitt í serligum førum. Tað kann vera til heilivág til pensjónist ella til viðgerð fyri ávísa sjúku. Harumframt ber eisini til hjá læknanum at søkja tilskotsnevndina um einstaklingstilskot.

**Gevið gætur:** Tað er sera umráðandi at fylgja við, nær tilskotsárið rennur út. Fyrst í nýggjum tilskotsári er heilivágurin upp á seg dýrur, tí egingjaldið er 100% av kostnaðinum upp til 500 kr. Síðan økist tilskotið í mun til útreiðslurnar, eins og víst á næstu síðu. Kunning um tilskotsárið sæst á kassakvittanini frá apotekinum, og snýr tað seg um sending, verður tilsvarandi kunning viðløgd.

**Reglurnar eru:**

- At tygum ikki fáa tilskot, um tygara heildarútreiðslur eru minni enn 500 kr. eftir einum tíðarskeiði á eitt ár.
- At tygum fáa tilskot á 50% til tann partin av útreiðslunum, sum eru millum 500 og 1.000 kr.
- At tygum fáa tilskot á 75% til tann partin av útreiðslunum millum 1.000 og 2.000 kr.
- At tygum fáa tilskot á 85% til útreiðslur millum 2.000 og 3.300 kr., um tygum eru yngri enn 18 ella eldri enn 67 ár.
- At tygum fáa tilskot á 85% til útreiðslur millum 2.000 og 6.000 kr., um tygum eru millum 18 og 67 ár.
- At tygum fáa tilskot á 100% til útreiðslur oman fyri 3.300 kr., um tygum eru yngri enn 18 ella eldri enn 67 ár. Í hesum aldursbólki kunnu tygum ongantíð koma at rinda meiri enn 1.195 kr. í einum tilskotsári.
- At tygum fáa tilskot á 100% til útreiðslur oman fyri 6.000 kr., um tygum eru millum 18 og 67 ár. Í hesum aldursbólki kunnu tygum ongantíð koma at rinda meiri enn 1.600 kr. í einum tilskotsári.

heilsutrygd

| Tilskotið pr. persón er í prosentum samsvarandi við árliga keypið: | Tilskot til persónar millum 18 og 67 ár | Tilskot til persónar yngri enn 18 og eldri enn 67 ár |
|---|---|---|
| 0 - 500 kr. | 0% | 0% |
| 500 - 1.000 kr. | 50% | 50% |
| 1.000 - 2.000 kr | 75% | 75% |
| 2.000 - 3.300 kr. | | 85% |
| 2.000 - 6.000 kr. | 85% | |
| Oman fyri 3.300 kr. | | 100% |
| Oman fyri 6.000 kr. | 100% | |

**1. dømi: Millum 18 og 67 ár**
Um tygum eru millum 18 og 67 ár og keypa fyri 3.370 kr. í tilskotsheilivági, skulu tygum sjálv/-ur gjalda 1.205,50 kr. Sí útrokningarnar í talvuni niðanfyri:

| 1. dømi | Tilskot í %-um | Sjúklingur | Tilskot | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 500 kr. | 0% | 500 kr. | 0 kr. | 500 kr. |
| 500 - 1.000 kr. | 50% | 250 kr. | 250 kr. | 500 kr. |
| 1.000 - 2.000 kr. | 75% | 250 kr. | 750 kr. | 1.000 kr. |
| 2.000 - 3.370 kr. | 85% | 205,50 kr. | 1.164,50 kr. | 1.370 kr. |
| SAMANLAGT | | 1.205,50 kr. | 2.164,50 kr. | 3.370 kr. |

Í hesum aldursbólki kunnu tygum ongantíð koma at gjalda meira enn 1.600 kr. í einum tilskotsári.

**2. dømi: Yngri enn 18 ella eldri enn 67 ár.**
Um tygum eru yngri enn 18 ella eldri enn 67 ár og keypa fyri 3.370 kr. í tilskotsheilivági, skulu tygum sjálv/ur gjalda 1.195 kr. Sí útrokningarnar í talvuni niðanfyri:

| 2. dømi | Tilskot í %-um | Sjúklingur | Tilskot | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|
| 500 kr. | 0% | 500 kr. | 0 kr. | 500 kr. |
| 500 - 1.000 kr. | 50% | 250 kr. | 250 kr. | 500 kr. |
| 1.000 - 2.000 kr. | 75% | 250 kr. | 750 kr. | 1.000 kr. |
| 2.000 - 3.300 kr. | 85% | 195 kr. | 1.105 kr. | 1.300 kr. |
| 3.300 - 3.370 kr. | 100% | 0 kr. | 70 kr. | 70 kr. |
| SAMANLAGT | | 1.195 kr. | 2.175 kr. | 3.370 kr. |

Í hesum aldursbólki kunnu tygum ongantíð koma at gjalda meira enn 1.195 kr. í einum tilskotsári.

### Umbýti av heilivági

Flestallur heilivágur verður býttur um við bíligasta heilivág, um tað snýr seg um sama virkna innihaldsevni. Um tygum ynskja dýrara heilivágin, mugu tygum sjálv/-ur gjalda munin. Tó ber til hjá lækna at søkja tilskotsnevndina um hækkað tilskot. Sí nærri á baksíðuni (grein 21 og 22).